VINNUSÍÐURNAR

# Viðurskifti umborð á skipum



*Frá aðalfundinum í Fiskimannafelagnum í Norðurlandahúsinum í gjár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fiskimannafelagið hevur týsdagin aðalfund. Millum evnini, sum vórðu umrødd, vóru sjálvandi tey viðurskifti, sum sjómenn dagliga liva við**

SJÓMANSLÍV
*Føroya Fiskimannafelag*

Fyrst í apríl mánaði fekk Skipaeftirlitið bræv frá Føroya Fiskimannafelag og Føroya Skipara- og Navigatørfelag um arbeiðs-, gang- og vatnsviðurskifti umborð á føroyskum fiskiskipum.

Skipaeftirlitið hevur svarað aftur og sagt, at hesi viðurskifti umborð á fiskiskipum hava fleiri ferðir verið á lofti á felagsfundum á stovninum.

Tey eldru skipini vóru bygd tá so at siga ongar reglur vóru um hesi viðurskiftir. Skipaeftirlitið fer framyvir at royna at broyta reglarnar um arbeiðshæddir og hæddir í manningarrúmum. I dag eru reglurnar ávikavist 2,00 m og 1,98 m. Hetta vil Skipaeftirlitið royna at broyta munandi; men slíkar broytingar mugu viðgerðast. Her hava feløgini møguleikan at ávirka úrslitið.

Eitt annað, sum Skipaeftirlitið fer at kannað, er fukt/ventilatión í manningarrúmum. Nógv av teimum eldru skipum hava lítla ella onga ventila-tión. Og við hita er so sum so.

Sum kunnugt eru fá skip bygd seinnu árini. Men nú sær út til at glið er við at koma í bygging av skipum. Millum annað verða tvey skip liðugtbygd í Havn til várs. Her eru komnar tekningar um hvussu roynt verður at fyribyrgja gangi í skipunum. Her verður kulda og ljóðbjálva fram móti last og uppundir paunin. Eisini eru dúrk í manningarrúmum løgd flótandi.

Tá fyrsta skipið er liðugt verða ljóðmálingar gjørdar. Úrslitið vil vísa um bjálvingin er nóg góð. Hetta verður framyvir brúkt sum grundarlag. Eftirlitsfólk frá stovninum fara at gera smakkroyndir ella taka royndir av vatninum til kanningar. Møguleiki er eisini fyri at seta krav um, at drekki-vatnið verður kannað regluliga.

## Stongt nýggjársaftan

Føroysku peningastovnarnir hava boðað frá, at avgreiðslur teirra eru stongdar nýggjársaftan.

Fyri flytingar, sum skulu vera avgreiddar í ár, er seinasta freist at gera hesar umvegis netbanka, heimabanka ella heimagreiðslu hósdagin.

Fyri flyitngar, sum verða avgreiddar í peningastovninum, er seinasta freist at avgreiða hesar mikudagin.

Sjálvvirkandi flytingar, sum eru settar til avgreiðslu 31. desember, verða ístaðin avgreiddar 30. desember, verður sagt.

**-jm**

## Netbrotsmenn lokka upplýsingar úr fólki

ALNETIÐ
*www.sparikassin.fo*

Eitt lið av dugnaligum brotsmonnum roynir at skapa sær vinning við at lokka peningastovnsupplýsingar úr fólki á alnetinum fyri síðani at stjala pening á kontum hjá fólkum, ið lata seg lumpa.

Ritzau skrivar um arbeiðsháttin hjá brotsmonnunum, at t.d. kundar hjá Eurocard í Svøríki hava fingið teldupost um, at innbrotsroynd er gjørd á kontu kundans, og at kontan av tí sama er »fryst«.

Ein leinkja í teldupostinum beinir síðani fólk til eina falska Eurocard-heimasíðu, har kundarnir verða bidnir um upplýsingar um teirra kredittkort til tess at fáa kontuna latna upp aftur.

Danska løgreglan sigur seg vera vitandi um tað, ið fyriferst uttanlands, og hon fylgir væl við í tí tilfari, sum kemur frá Europol.

## Vend í sethúsaprísinum?



RENTA
*www.foroyabanki.fo*

Evropeiski miðbankin hevur í longri tíð givið ábendingar um, at bankin er bangin fyri høgum príshækkingum. Hetta er ein av orsøkunum til, at tosað hevur verið um rentuhækkingar á seinasta rentufundi miðbankans. Spurningurin er tó, hvørt tosið um hækkandi prísvøkstur er vælgrundað? Tað kann hugsast, at prísvøksturin í Evropa kann verða nakað lægri enn tey 2%, sum miðbankin hevur sett sum mál. Tað eru ávísar ábendingar um, at prísvøksturin fer niður um hetta mál. Um tað fer at halda, kann hugsast, at miðbankin fer at broyta sína støðutakan. Fyrstu ábendingarnar hesum viðvíkjandi koma mikudagin, tá fyribils prísvakstrartøl úr Týsklandi verða kunngjørd.

Alsamt hækkandi sethúsaprísurin í Evropa seinastu árini, hevur verið eitt afturvendandi tema á fíggjarmarknaðinum. Nær fer prísurin at steðga ella venda? Í dag, týsdagin, kom vísital fyri sethúsaprísirnar í Onglandi. Hetta varð væl lægri enn roknað varð við. Tí er spurningurin, hvørt gongdin er um at venda, ella talan bert er um eina normalisering á økinum. Eftir at tølini vóru kunngjørd, lækkaði pundið frá 10,8 niður á 10,74.

Tað letur til at vøksturin í USA fer at lække í 2005. Tað eru kortini serliga tvey viðurskifti, sum kunnu broyta hetta: Lækkandi oljuprísir og støðugt hækkandi sethúsaprísir. Spurningurin er, hvørt gongdin í Bretlandi fer at breiða seg til onnur lond.

Fíggjarmarknaðurin er við at fara í jólafrí. Vikan, sum kemur, hevur ikki mong hagtøl at bjóða, og so er bert at vóna, at jólafriðurin eisini verður á fíggjarmarknaðinum.